## Tøkk

Eg vil fegin taka høvið, at takka øllum fyri blómur og blíðar heilsanir á mínum 70 ára føðingardegi. Til gamlar kenningar, ið tóku sær tíð til eitt lítið prát í telefonini og tey, ið komu inn á gólvið.

Eina serliga heilsan og hjartaliga takk til døtur mínar og sonin, fyri ein minniligan føðingardag.

**Heilsan Elisabeth Hammerfoss**

## Tøkk



Fyri sýndan heiður á 90 ára føðingardegi mínum takki eg hjartaliga.

**Alfred Magnussen, Vágur**

## Tøkk

Nú vit hava selt bilverkstaðið í Trongisvági, vilja vit fegin takka øllum kundum okkara fyri gott samstarv tey umleið 30 árini.

Samstundis ynskja vit nýggju eigarunum góðan byr.

**Sp/f Mogens Petersen**
**Sigrun & Mogens Petersen**

## Silvurbrúdleyp

*Næsta leygardag, 19. august, halda vit bæði, Birna & Óli, silvurbrúdleyp.*

Tit, kæru skyldfólk, vinir og kenningar, sum hava hug at gleðast saman við okkum um hesi signaðu 25 árini sum hjún, eru vælkomin inn á gólvið til eina matliga hugnaløtu í Losjuni við Tinghúsvegin í Havn millum kl. 12 og 17.




# 90 ára føðingardagur



Í dag fyllir Lena í Beiti í Sørvági 90 ár. Lena er ættað úr Klaksvík og vóru foreldur hennara Óla Jákup Jacobsen millum Garðarnar í Klaksvík og Anna Sofía Thomsen úr Svínoy.

Lena er næstelst í einum systkinnaflokki av 7. Elstur var Jósef, síðan Lena, Anna Katrina, Lisa, Rasmus, Diana og Kristoffer.

Lena giftist vestur til Sørvágs við Hans í Beiti, sum andaðist í 2000. Tey ættleiddu sonin Ólav.

Lena hevur frá tí legurnar byrjaðu í Vatnsoyrum í 1967, verið álit í køkinum í Zarepta. Á hvørjum ári hevur hon verið í Zarepta ein stóran part av summarinum. – Tá umvælingararbeiði og nýbygging hevur verið í vetrarhálvuni, hevur Lena eisini verið og gjørt mat til arbeiðsfólkið. Eisini seinnu árini, tá samkomurnar byrjaðu at hava legur í vetrarhálvárinum, hevur Lena altíð verið klár at hjálpa til. Hans í Beiti, maður Lenu var henni ein dyggur stuðul í arbeiðinum, og minnast vit hann við takksemi.

Lena hevur hildið trúfast fram í arbeiðinum í Zarepta, til hon fyri fáum árum síðan ikki orkaði meira. Legurnar hava ligið henni tungt á hjarta og er Lena kend av mongum sum omman í Zarepta.

Hóast Lena nú er illa gongd, vitjar hon framvegis av og á í Zarepta.

Vit takka Lenu fyri ótroyttiliga trúskap hennara í arbeiðinum í Zarepta og heilsa henni á 90 ára degnum við tveimum ørindum úr sanginum, "Vit ferðast heim", ið Brynleif Hansen týddi og sum hevur verið nógv sungin í Zarepta:

*Vit ferðast heim at møta teim,*
*sum synd og sorg ei kenna,*
*tí leiðin ber, har Jesus er,*
*har tár ei meiri renna.*

*Og skjótt vit ná um lívsins á,*
*har Jesus okkum fagnar.*
*Tá lokin er vár pílgrímsferð,*
*og stríðið harða tagnar.*

*Niðurlag:*
*:,: Vit ferðast heim, vit ferðast heim til Jesus. :,:*

Hjartaliga tillukku!

**Zareptavinir**

**Prógv**
28. juni 2006 fekk Marner Nolsøe, Hov, prógv sum djóralækni (cand. med. vet) á Den Kgl. Veterinær- og Landbohøjskole í Keypmannahavn.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 13. august fyllir Ebba Joensen, Klaksvík 80 ár. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi frá kl. 15.00-20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin 13. august verður Eleonora Joensen í Oyndarfirði 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnum og barnabørnum á Gjáargarði.

Mánadagin 14. august fyllir Hanna Lisberg 80 ár. Føðingardagurin verður hildin á Hafnia fyri innbodnum.

**90 ára føðingardagur**
Leygardagin 12. august hevur Lena í Beiti í Sørvági 90 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Kedron frá kl. 16.00-20.00.

**Brúdleyp**
Í dag 11. august kl. 16.30 giftast í Ebenezer, Tórshavn, Dora Lómstein, Tórshavn, og Niels Pauli Nónstein, Hvalba. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 12. august kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Beinta Wardum og Ragnar Simonsen. Veitsla verður fyri innbodnum í Havnar Róðrarfelag kl. 18.00.

Leygardagin 12. august giftast Anja Petersen Klaksvík og Elvin Olsen Hvalba. Vígslan verður í Betesda kl. 15.00. Veitslan verður um kvøldið kl. 19.00 fyri innbodnum í Skálanum í klaksvík.

Leygardagin 12. august giftast í Århus Pinsekirke Bjørg Hansen, dóttir Marnu og Adolf Hansen, sála, og Karl Johan Brun Larsen, Varde.

Leygardagin 12. august kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju, Birita Jacobsen, Syðrugøta og Henning Jarnskor, Norðragøta. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

# Móttøka

*Í sambandi við at Oddvá Nattestad er sett sum dagligur leiðari í býarleikhúsi okkara, Sjónleikarhúsinum, verður móttøka í húsinum mikudagin 16. august kl. 16*

**Havnar Sjónleikarfelag**



Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum